# Keðiligt mál



*- Eg skuldi kanska heldur bara staðið og bíðað í hasi støðuni, men tað er jú lætt at siga aftaná, helt Jákup Mikkelsen, sum iðraði seg um írska brotssparkið*

Mynd: Jens Kristian Vang

**Sær sjálvum so líkt, so var Jákup Mikkelsen skjótur at átaka sær ábyrgdina fyri írska brotssparki. Men hann helt eisini, at vit skjótt ikki hava tol at bíða eftir næsta stóra úrslitinum**

MÁLVERJIN
*Jákup Mørk*

Lagið var einki serligt á Jákupi Mikkelsen, tá vit eftir dystin fingu orð á hann.

Óhepni leikluturin við írska leiðslumálið nívdi sjálvandi málverjan meira enn nakað annað, og honum so líkt, so var hann eisini skjótur at átaka sær ábyrgdina fyri hetta.

- Bólturin verður spældur innum, og eg eri á veg eftir honum. Eg ivist tó eina løtu, og tá eg so kortini fari út, er ov seint. Tá skuldi eg kanska heldur staðið og bíðað, men tað er jú lætt at siga, nú dysturin er av, helt hann.

Men ert tú samdur, tá sagt verður, Elliot spældi upp á brotssparkið í hasi støðuni?

- Tað eri eg. Men tað skal hann eisini gera í hasi støðuni.

## Ov nógv »næstan«

Annars var hesin dysturin avgjørt ikki ein av teimum, har Jákup hevur havt mest at gera. Fyri steðgin var talan um onkra hendinga skotroynd, og so sjálvandi returin, sum Elliot smekkaði langt uppum.

Sum Henrik Larsen segði, so tóktist tað tó, sum vóru okkara spælarar ikki heilt uppi í snúningum, tá farið varð í holt við seinna hálvleik, og málverjin var als ikki ósamdur í hesum.

- Soleiðis upplivdi eg tað eisini. Fyri steðgin koyrir annars alt júst so, sum tað skal. Heðin er enntá sera nær við at skora, so vit kundu eins væl verið á odda tá. Men onkursvegna, so fella vit nakað niður beint eftir steðgin. Og tað er eitt sindur irriterandi.

- Tað tykist, sum blívur tað bara við at vera næstan hjá okkum. Og nú eru vit av álvara farnir at leingjast eftir einum stórum úrsliti aftur, helt Jákup Mikkelsen at enda.

Roy Keane:

# – Vit høvdu neyðuga hepnið



*Uttan iva størsta stjørnan á írska liðnum er Manchester United-liðskiparin, Roy Keane, sum mikukvøldið aftur var á írska liðnum. Hann segði eftir dystin, at føroyingarnir mikukvøldið spæla væl betur enn í dystinum í Dublin seinasta heyst.*

Mynd: Jens Kr. Vang

**Størsta írska stjørnan, Roy Keane, helt eftir dystin móti Føroyum, at írar mikukvøldið høvdu neyðuga hepnið, sum teir mangan áður hava manglað**

FÓTBÓLTSPRÁT
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Nógvir írar vildu verða við, at tað hevði ein avgerðandi týdning fyri írska landsliðið, at teir mikukvøldið høvdu Roy Keane við aftur á liðnum, eftir at hann var leikbannaður móti ísraelum leygardagin í Dublin, har Írland tveitti ein 2-0 leiðslu fyri borð.

## Vit eiga at vinna á Føroyum

Manchester United-liðskiparin segði, at tað var umráðandi hjá Ìrlandi at reisa seg eftir javnleikin móti Ísrael, og tað eydnaðist eisini.

- Vit vistu, at tað fór at verða trupult, og veðrið og vøllurin gjørdu ikki fyritreytirnar hjá okkum betur. Men við teimum spælarunum, ið vit hava í hópinum, so eiga vit at vinna á Føroyum, uttan tó at taka nakað frá føroyingunum, sum spældu væl betur í kvøld, enn teir gjørdu í Írlandi, segði Roy Keane eftir dystin.

Írski miðvallarin helt eisini, at Írland mikukvøldið hevði tað neyðuga hepnið, ið onkuntíð skal til fyri at vinna ein dyst, og tað hevur Írland mangan manglað. Eg haldi tó, at vit høvdu uppiborið sigurin, og tey trý stigini var tað, ið vit komu eftir, segði hann.

## Ógvuliga uppsettir

Roy Keane segði, at spælararnir hildu, at írsku fjølmiðlarnir høvdu verið ógvuliga harðir við liðið eftir javnleikin móti Ísrael, og tí vóru teir ógvuliga uppsettir til dystin móti føroyingunum.

Spurdur hvat Írland kundi brúka frá dystinum móti Føroyum til næsta HM-undandystin, sum verður móti Fraklandi í Dublin, segði Roy Keane.

- Teir báðir dystirnir kunnu als ikki samanberast. Okkara spælarar eru ógvuliga troyttir nú, tí vit hava verið í gongd nú í 10-11 mánaðar. Tá ið vit spæla móti fraklendingum eru vit akkurát farnir í gongd aftur, so tá eru spælararnir vónandi eitt sindur meiri neyvir og frískir, segði Roy Keane, sum vísti aftur, at Frakland eru favorittar at vinna dystin móti írum.

# Visti av ongum

**Tað var ikki fyrr enn klokkan 11 á dystardegnum at Heðin á Lakjuni fekk at vita, at hann fyri fyrstu ferð skuldi byrja inni í undankappingardysti**

KJANSURIN
*Jákup Mørk*



*- Sjálvur haldi eg, at pulsurin í dag ongan tíð kom so høgt upp, sum hann var hasa lítlu løtuna á Svangaskarði, helt Heði um munin at byrja inni og at verða skiftur inn*

Mynd: Jens Kristian Vang

Kanska var mest óvæntaða broytingin mikukvøldið var, at Heðin á Lakjuni hesa ferð slapp at byrja millum teir fyrstu ellivu.

Hóast hann hevur verið partur av landsliðsmyndini í fleiri ár, so var hetta fyrsta ferðin, at hann skuldi byrja inni í einum týðandi dysti. Og tá vit eftir dystin fingu orðið á hann, duldi hann ikki fyri, at hann var fegin um møguleikan, sum hann nú hevði fingið.

- Eg fekk boðini í morgun klokkan 11, og sjálvandi var eg fegin um tað.

Hevði venjarin einki givið til kennar um hetta áðrenn taktikk-fundin?

- Nei, slettis ikki. So hetta kom púrasta óvart á meg. Í øllum førum hevði eg als ikki roknað við hesum møguleikanum.

Og í dystinum var eisini líkt til, at tú alt fyri eitt kom væl við í spælið. Leygardagin vart tú hinvegin als ikki við í spælinum, ta løtuna, sum tú vart inni. Er tað veruliga so stórur munur á at byrja inni og at verða skiftur inn?

- Ja. Tað er fullkomuliga hvør sítt. Sjálvur haldi eg, at pulsurin í dag ongan tíð kom so høgt upp, sum hann var hasa lítlu løtuna á Svangaskarði. Tá tú verður tveittur inn, so skalt tú venja teg við ferð, undirlag og dystin sum heild innan stutta tíð, og tað kann vera sera tungt. Tá er tað munandi lættari at byrja inni, soleiðis at tú alla tíðina kennir, hvussu dysturin gongur.

## Skuldu renna í tómrúmið

Sjálvur fekk Heðin til tíðir rættiliga dusað sær í góða plássinum, sum føroyingarnir fingu at spæla á. Men eins og venjarin, so legði Heðin dent á, at hetta als ikki var so óvæntað.

- Tað var júst hetta, sum vit høvdu tosað um undan dystinum. Við at leggja trýstið høgt, so bleiv pláss aftanfyri, og hetta skuldu vit nýta. Setningurin hjá bæði mær og Julian var at leita niðan í hetta plássið, og tað riggaði eisini væl. Serliga fyri steðgin.

- Eftir steðgin detta vit niður eina løtu, men eg haldi kortini, at vit koma væl við aftur seinastu løtuna, tó at tað sjálvandi ikki kastaði nakað mál av sær, helt Heðin á Lakjuni at enda.